# TILTØK

**Lívdin**
*Í Hoyvíkar skúla*
Hvítusunnumorgunin kl. 10.30 á familjumøtinum verður "Global day of Prayer (Alheimsbønardagur) tiltak". Kl. 11.30 Samfelagsløta við drekka. Kl. 12 Á tilbiðjunarmøtinum verður "Global day of Prayer (Alheimsbønardagur) tiltak". Barnaansing er undir møtinum
Sunnudagsskúlin er kl. 12
Týskvøldið kl. 20 møti á Brekku 3.
*www.livdin*

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00 Møti, kl. 18.00 Evangel. møti. Øll eru vælkomin.

**KFUM og KFUK í Havn**
Hóskvøldið 1. juni kl. 19.30 í KFUK: Hugnaløta.
Mánadagin 5. juni: Ongin eldrasamkoma vegna 2. hvítusunnudag.

**Hvítusunnustevnan í Kollafirði**
**Missiónshúsið í Kollafirði**
Hóskvøldið 1. juni kl. 20.00: Bønarmøti í sambandi við stevnuna.
Fríggjakvøldið 2. juni kl. 20.00:; Stevnan verður sett. Mogens T. Christensen prestur talar. Irena og Sonja syngja.
Leygarkvøldið 3. juni kl. 20.00: Møti í skúlanum.
Hvítusunnudag 4. juni kl. 18.00: Møti í skúlanum.
2. hvítusunnudag 5. juni kl. 18.00: Møti í skúlanum.
Eftir møtini í skúlanum verður bjóðað til ein drekkamunn og ábit í Missiónshúsinum. Skipað verður fyri sang- og vitniløtu í Missiónshúsinum við ymiskum sang- og talikreftum. Innsavnan verður við øll møtini í skúlanum.
Hesi luttaka við sangi, talu og vitnisburði: Margar Toftegård, Jógvan Lamhauge, Thomas J. Askham, Hjalgrím Davidsen, Solveig Joensen, Alica Andreassen, Hedvig Winther, Elisabeth, Leo, Edilborg Petersen, Vivi Hammer, Kórið í Soli Deo Gloria, Ekklesia, Oasu-brøðurnir, Gullak og Jónhilda Hansen.
Vælkomin til stevnuna.

**Saron, Vestmanna**
Fríggjadagin 2. juni byrjar hvítusunnustevnan í ítróttarhøllini undir heitinum »Hvítusunnu tá?/Hvítusunna nú?« við konsert kl. 21.00.
Leygardagin 3. juni:
Kl. 15.00: Útimøti á Torginum.
Kl. 18.00: Syng við kvøld við heitinum »Lívsælir tónar«. Kaffi og køkur aftaná.
Lovsongskonsert kl. 22.00.
Hvítusunnudag 4. juni:
Kl. 11.00: Morgunmøti við breyðbróting.
Kl. 15.00: Útimøti á torginum.
Kl. 18.00: Møti.
Kl. 18.45: Barnamøti í fimleikarhøllini.
Kaffi og køkur aftaná.
Kl. 22.00: Lovsongskonsert.
2. hvítusunnudag 5. juni:
Kl. 15.00: Útimøti.
Stevnan endar við møti kl. 18.00.
Barnamøti í fimleikarhøllini kl. 18.45.
*Øll innimøtini verða í Ítróttarhøllini. Verið hjartaliga vælkomin.*

**Missiónshúsið í Sørvági**
Barnaansing verður á øllum kvøldmøtunum á hvítusunnustevnuni.

**KEDRON í Sørvági**
Hvítusunnudag: Morgunmøti v/ breyðbróting kl. 11.00.
Sunnudagsskúli fyri øll børn verður í kjallaranum kl. 11.30.
Evangeliskt møti verður kl. 18.00.
Øll eru hjartaliga vælkomin.
2. hvítusunnudag onki møti.

**Filadelfia Vágar, Miðvágur**
Fríggjakvøldið kl. 21 byrjar hvítusunnustevnan í Ítróttarhøllini í Vestmanna. Eingi møti og eingin sunnudagsskúli sunnudagin vegna hvítusunnustevnuna í Ítróttarhøllini í Vestmanna.
Mikukvøldið 7. juni kl. 20.00: Undirvísing og bøn.
Hóskvøldið 8. juni kl. 20.00: Ungdómsmøti.

**Kollafjarðar missiónshús**
Vælkomin til hvítusunnustevnuna í døgunum 2.-5. juni.

**Thabor, Fuglafjørður**
Leygarkvøldið er ungdómsmøti kl. 21. Hvítusunnudag er familjumøti kl. 18.00. Barnakórið syngur. Eisini er nátturði. Innsavnan til Thabor. 2. hvítusunnudag kl. 18 er Thaborfundur. Kunnað verður um arbeiðið og framtíðarætlarnir.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Fríggjakvøldið kl. 19.30: Ungdóms gudstænasta í Glyvra kirkju.
Hvítusunnudag verður ongin sunnudagsskúli.
Hvítusunnudag kl. 18.00: Møti við Dánjal P. Dalbø. Innsavnan til húsið.
2. hvítusunnudag kl. 18.00: Møti v/ Johild Finnson.

**Missiónshúsið í Leirvík**
*Hvítusunnumøtir*
Leygardagin 3. juni kl. 20 Pól Johannesen, Hvannasund. Sangbólkur úr Klaksvík syngur.
Hvítusunnudag kl. 18 Regin og Hella Olsen, Tórshavn Ungdómskór syngur.
2. hvítusunnudag kl. 18 Húsakórið luttekur við talu, sangi og vitnisburði.
Innsavnan til húsið.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Rituvík**
Sudanringurin kemur saman týskvøldið 6. juni kl. 19.00. Øll eru vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21: Awake við Anniku Høj. Sunnudagin kl.17: Møti við Helga Abrahamsen o.fl. Barnamøti kl. 17.
Vælkomin í Kelduna
*www.keldan.fo*

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl.18.00: Møti. Øll hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Vági**
Um Gud vil verður Hvítusunnustevna í Vági leygardagin 3. juni kl. 20.00. Sunnudagin og mánadagin kl. 18. Talarar: Snorri Brend, Jógvan Højgaard og aðrir. Kór úr Porkeri, Sumba og Tvøroyri luttaka.
Verið hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Hósdagin 1. juni kl. 16.00: Barnakórið venur.
Hvítusunnudag kl. 14.00: Sunnudagsskúli.
Hvítusunnudag kl. 18.00: Evangeliskt møti, Eyðun Christiansen talar.
2. hvítusunnudag kl. 18.00: Evangeliskt møti, Eddie Bech talar.
Øll eru vælkomin!

**Frá Aglow & YWAM í Suðuroy**
Hesi møti verða í Fylking á Tvøroyri 2.-4. juni 2006 við Elisabeth Sýre.
Fríggjakvøldið 2. juni kl. 21.00.
Leygardagin 3. juni kl. 11.00, 15.00 og 20.00.
Sunnudagin 4. juni kl. 11.00 og 17.00. Møguleiki er at eta døgurða og náttурða leygardagin og sunnudagin, við at tilmelda seg hjá Maluni Hentze á tlf. 370538. Kostnaðurin fyri allar máltíðirnar er 250 kr. Møtini eru bæði fyri kvinnur og menn.

**Soli Deo Gloria**
Hvítusunnudag 4. juni einki møti.
2. hvítusunnudag, 5. juni, kl. 18 tosa Edith og Niels Peder Johannesen evni " Fri af fortiden håb for fremtiden."
Týsdagin 6. juni kl. 20 tosa Edith og Niels Peder Johannesen " Fri af fortiden håb for fremtiden."
Mikudagin 7. juni kl. 20 tosa Edith og Niels Peder Johannesen " Fri af for tiden håb for fremtiden.

**KFUM OG KFUK Klaksvík**
Hóskvøldið kl.19.00 bønarløta. Fríggjakvøldið kl. 22.00 "opið hús". Øll vælkomin.
*www.kuff.fo*

**Getsemane**
*á Brekku 19 Klaksvík*
Fríggjadagin kl.20.30 er ungdómsmøti.
Leygardagin kl.10.00 er morgunbøn og kl.21.00 Ungdómsróp.
Sunnudagin kl.11.00 er morgunmøti við sunnudagsskúla. André Matras talar.
Hvønn gerandismorgun kl. 6.15 er morgunmøti.

**Felagið Tórshavn: GONGUTÚRUR**
2. hvítusunnudag 5. juni verður gingið inn til Fransatoftir. Farið verður frá Oyggjarvegnum kl. 15.00 eftir vegnum inn til vatnverkið. Túrurin er lættur, og tað ber væl til at taka børn við á túrin. Gingið verður uml. 2 tímar, minst til at hava góð og heit gonguklæðir og ein drekkamunn við. Tilmelding.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Teldupostur: tilhald@torshavn.fo
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
***Hósdagin 1. juni***
kl. 10.00-10.30 Fimleikur - Sonja Danielsen
kl. 14.00-17.00 Telduprát - Vegleiðing er á staðnum.
kl. 14.00-16.00 Boccia í kjallaranum - Alma Poulsen
***Fríggjadagin 2. juni***
Mentanarnáttin - Húsið verður opið fyri almenninginum. Drekkamunnur og køka verður at fáa í Tilhaldinum.

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Tilhaldið á Toftum**
*Tlf. 448690*
*Vit halda til í niðaru hædd á Vesturskin.*
*Teldupost: tilhaldnes@post.fo*
Opið er týsdag, mikudag og hósdag. Frá kl. 15.00 – 18,00
Týsdag: Kl 15,00 Møtast vit í gamla prestagarði á Nesi til kaffi og hugna.
Mikudag: Kl 15,00-16,00 Syngja vit úr grønu bók. Kl. 16,00 er filmur vit halda fram at síggja MATADOR
Hósdag: kl. 15,00 Er ættarprát, tosað verður um staðarnøvn á Toftum.
Ymiskt handaligt ítriv.
Vit hava hvønn dag ein góðan drekkamunn, eins og vit hava nógv spøl, og annað ítriv.
Vit ynskja at øll kenna seg væl og hugnað sær.

**Dagtilhaldið Fløvi**
*Í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum.Tlf. 448279.*
Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið er mánadag til fríggjadag kl. 15-18.
***Hósdagin 1. juni***
Opið hús
***Fríggjadagin 2. juni***
Opið hús

*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl og bøkur. Tú ert vælkomin at hava títt egna hondarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
er opið mánadag og mikudag frá kl. 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Eisini eru bløðini til taks.

**Frá Dagtilhaldinum á Strondum**
Dagtilhaldið á Strondum er opið týsdag og hósdag frá 15-18.
Hósdagin 1. juni hugna vit okkum saman og binda.

**Dagtilhaldið í Luffustovu, Fuglafjørður**
*Opið er týs-, miku- og hósdag frá kl. 15.00-18.00*
***Týsdag***
Kort og onnur spøl.
***Mikudag***
Ítriv: silvurarbeiði og annað
***Hósdag***
Fimleikur
*Hvønn dag drekka við nýbakaðum.*

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
Opið er:
Mánadag og mikudag kl. 13.30-17.30.
Týsdag og Hósdag kl. 9.30-17.30
Teldupostur: dagtilhaldid@post.olivant.fo
***Mánadag***
Tilmeldan til døgurða týsdag áðrenn kl 17.00 á tlf. 459091
***Týsdag***
kl. 9.30 Gongutúrur
kl. 11.00 bløðini verða lisin fyri sjónveikum
kl 12.00 Døgurði
***Mikudag***
kl. 13.30 Telda
***Hósdag***
kl. 10.00 fimleikur
kl. 11.00 telda
kl. 13.30 bløðini verða lisin fyri sjónveik

*Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks. Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a.*
***Hvør dagur endar við andakt og sangi.***
***Øll eru hjartaliga vælkomin.***

**Eldrafelagið Nón**
Í vetur koma vit saman til handaligt arbeiði hvønn týsdag frá kl. 15.00 til 18.00.

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Frits Jacobsen, tlf. 332053 ella ein av nevndarlimunum.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru

## 70 ár
Leygardagin 3. juni verður Tórbjørn Mikkelsen, fyrrv. stjóri á Toll- og skattstovuni, 70 ár. Dagurin verður hildin í losjuni, Tinghúsvegur 18. frá kl.10–14. Øll eru vælkomin.

## Silvurbrúdleyp
10. juli hava Dania og Jens Erik Magnussen, Miðvági, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Miðvági fríggjadagin 14. juli kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 30. juni á tlf. 267969, 211980 ella 333580.

18. juli hava Petsy og Thormóð Nielsen, Skopun, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin 15. juli kl. 19.00 í Samljóð. Tey, ið vilja gleðast saman við silvurbrúðarparinum, verða biðin um at siga frá í seinasta lagi 28. juni á tlf. 361630 ella 222665.

Týsdagin 25. juli hava Maureen og Petur Hammer, Tvøroyri, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í høllini í Trongisvági leygardagin 22. juli 2006 kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 10. juli á tlf. nr. 371637 og 284037.

## Brúdleyp
3. juni kl. 16.00 giftast í Leitis kirkju Guðrun Midjord, Lopra og Johan F. Nystrøm, Klaksvík. Tey, ið vilja gleða brúðarparið eru hjartaliga vælkomin í bygdarhúsið í Lopra kl. 19.00.

Leygardagin 3. juni kl. 15.00 giftast í Fríðrikskirkjuni á Toftum, Amanda Lamhauge Hansen, Nes, og Hans Jákup Hansen, Argir. Veitslan verður fyri innbodnum í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18.30.

Leygardagin 17. juni kl. 15.00 giftast í Fríðrikskirkjuni á Toftum, Súsanna Kass Nielsen, Nes og Heini Súnason Kristiansen, Skáli. Veitslan verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18.30. Tey, sum vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 7. juni á tlf. 211222, 507600 ella 448321, 441539.

Leygardagin 24. juni kl. 10.30 giftast í Kelduni í Skálafirði, Dora Jacobsen, Saltangará og Petur Olivur Splidt, Tórshavn. Veitslan verður á Hotel Føroyum fyri innbodnum.

Leygardagin 24. juni giftast Debora Eivinnsdóttir Bringsberg úr Klaksvík og Høgni á Reynatrøð úr Runavík. Vígslan verður í Kelduni í Skálafirði kl. 14.00. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at tekna seg við at ringja á tlf. 269942/455893, Debora ella 267287/448128, Høgni, áðrenn fríggjadagin 9. juni.

Leygardagin 1. juli kl. 14.00 giftast í Fríðrikskirkjuni á Toftum, Hansy Davidsen Toftir og Ronni Svalbard Nes. Tey, ið vilji gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 12. juni á tlf. 253941, 264102, 449190, 448220 og 448423.